# Vegleiðing í sambandi við andlát

***Tá onkur í familjuni doyr, eru tað fleiri praktisk ting at taka sær av. Hetta skrivið er bert ein vegleiðing.***





**Suðuroyar Sjúkrahús**

*www.ssh.fo*

Tygum skulu seta tygum í samband við deildarleiðaran á seingjadeildini tlf. 34 33 00 helst millum kl. 8 og 15.

**Kista og líkklæðir:** Kista og líkklæðir verða bíløgd av tygum.

**Kistuveitarar:**
**Suðuroy:**
Eilif Dimon tlf. 26 66 15  verk@sv.fo
Herman Olsen tlf. 56 62 31  sh-bygg@hotmail.com

**Streymoy og meginøkið:**
Biðimansfyritøkan Sólsetur tlf. 35 36 37/29 90 00  www.solsetur.fo
Gravarhjálp v/Hermann Eysturoy tlf. 51 17 23  www.gravarhjalp.fo
Hans Jacobsen tlf. 31 16 90/21 86 90/27 04 14  www.kistur.fo
Seinasta heilsan v/Halaldur S. Hammer tlf. 51 30 70  www.sh.fo

**Norðoyggjar:**
Eiler Jacobsen tlf. 21 64 82/45 64 82  eilerj@olivant.fo

**Vágar:**
Sandavágs Timburhandil tlf. 33 27 00  timbur@timbur.fo

Verður kistan bíløgd norðanfjørðs, mugu tygum koyra hana av Krambatanga til sjúkrahúsið, ella har farið verður frá.

Heilsutrygd veitir gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi kr. 5.000. Sí www.heilsutrygd.fo

Umsókn og kvittan skulu sendast til:

Heilsutrygd
Klaksvíksvegur 7
700  Klaksvík

**Lýsing um andlát**:
Vilja tygum lýsa andlátið, fráferðina úr kapellinum og jarðarferðina í útvarpinum, verður hetta fráboðað teimum.
Vanligt er at lýsa, tá tey nærmastu hava fingið boðini, og allar avtalur eru gjørdar.

Útvarpið tlf. 34 75 00        andlat@kvf.fo

**Fráferð úr kapellinum og jarðarferð**:
Tygum skulu tosa við prest, ella onkran í samkomu tygara, um fráferð úr kapellinum og jarðarferðina. Eisini kunnu tygum tosa um talu, ið skal haldast, sangir o.a.. Spyr prest um klokkara og organist.

**Nær verður lagt í kistu**:
Sama dag, sum farið verður úr kapellinum, verður tann deyði lagdur í kistuna.
Tygum kunnu vera við at leggja í kistuna, um tygum ynskja tað.
Deildarleiðarin skal hava boð um, nær lokið skal leggjast á og nær farið verður úr kapellinum.
Ynskja tygum at síggja tann, ið er deyður, er best at koma um dagin.
Sigið deildarleiðaranum frá, áðrenn tygum koma.

**Egin klæðir**:
Ynskja tygum, at tann deyði skal í egin klæðir, eru tygum vælkomin at koma við klæðum.

**Børubukett**:
Børubukett verður bíløgd av tygum. Sig blómuhandlinum frá nær kistan fer úr kapellinum.

**Líkbilur:**
Líkbilur skal bíleggjast at koyra úr kapellinum og til jarðarferðina. Líkbilurin hjá Tvøroyrar Býráð kann bíleggjast á tlf. 57 99 26 ella 61 10 85. Kommunurnar gjalda líkbilin.

**Berarar:**
Vanligt er, at 6 berarar eru til kistuna, uttan so, at onnur avtala er gjørd, tá kistan er bíløgd.

**Gravari:**
Setið tygum í samband við gravaran so skjótt sum til ber. Er kistan longri alla breiðari enn vanligt, skal gravarin hava boð um hetta. Kommunan vísir á, hvør gravarin er.

**Sangarar:**
Í kirkjum og samkomum eru sangarar.
Tygum mugu spyrja tygum fyri har, hvørjir hesir eru og síðan seta tygum í samband við teir.

**Erv:**
Erv er tað nøkur sum halda í heiminum hjá tí, ið er deyður, hjá avvarðandi, á matstovum ella í bygdar- & samkomuhúsum.

**Fráboðan:**
Sjúkrahúsið boðar myndugleikunum og skiftirættinum frá andlátinum.

Við samkenslu.

20. sept. 2019